# *Tingskipanin*

*Heimilað í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya § 16 hevur Løgtingið á løgtingsfundi hin 1. juni 1995, 15. mai 1996, 23. apríl 1999, 2. mai og 14. desember 2007, 31. mai 2008, 10. mai 2010 og 14. mai 2011 ásett:*

© Løgtingið 2011

**INNIHALDSYVIRLIT**


**Kap. I Tingskipanin** 5
At góðkenna løgtingsvalið 5
Val av løgtingsformanni og næstformonnum6
Formansskapur løgtingsins 6
Løgtingsformaður 7
Stjóri tingsins 8

**Kap. II Løgtingsnevndi**r 9

**Kap. III Tingmál** 13
Løgtingslógaruppskot 13
Uppskot til ríkislógartilmæli 16
Løgmanstilnevning og misálit
á løgmann og landsstýrismann 16

Uppskot til samtyktar 17
At velja fólk 18
Frágreiðingar frá løgmanni ella landsstýrismanni, skrivligir og munnligir fyrispurningar 18
Frestir, afturtøka og at vísa burtur tingmál 21

**Kap. IV Fundarskipan** 23

**Kap. V Atkvøðugreiðslur** 27

**Kap. VI Ymsar ásetanir** 28

**Kap. VII Gildisfyriskipanir og skiftisreglur** 30

**Talutíðir** 31

## KAP. I SKIPAN TINGSINS

### At góðkenna løgtingsvalið

**§ 1.** Á fyrsta løgtingsfundi eftir val koma saman í tinginum tey, sum hava fingið valbræv frá valnevndini.
*Stk. 2.* Tey kunnu bara umrøða og atkvøða í spurninginum um valgildi.

**§ 2.** Elsta fólk á tingi á aldri, aldursformaðurin, tekur sæti í formanssessinum sum fyribilsformaður og heitir á 5 vald at kanna valbrøvini.

**§ 3.** Hesi 5 valdu kanna valbrøvini hjá teimum, sum vald eru.
*Stk. 2.* Í felag kanna tey síðan:
1) Útskriftirnar úr gerðabók valnevndarinnar,
2) klagur um valið,
3) at tey valdu eru myndug, hava danskan ríkisborgaraskap og eru heimahoyrandi í Føroyum sbr. stýrisskipanarlógini § 3,
4) um nakar valdur ikki lýkur treytirnar í stýrisskipanarlógini § 4, stk.1, tí at hann er revsaður fyri gerð, sum nevnd er í stk. 2 og 3 í somu grein.

**§ 4.** Tilmæli um góðkenning av valbrøvunum og um góðkenning av valúrslitunum verða munnliga løgd fyri tingið. Tingið tekur tá avgerð bæði um góðkenning av valbrøvunum og um góðkenning av valúrslitunum á sama fundi, sum uppskotini eru løgd fram. Atkvøtt verður fyri og ímóti.

**§ 5.** Tá valbrøv teirra valdu eru góðkend við atkvøðugreiðslu, eru tey formliga løgtingsmenn og hava allar tær heimildir og øll rættindi, sum stýrisskipanarlógin veitir teimum.

**§ 6.** Aldursformaðurin krevur nú av hvørjum løgtingsmanni, at hann við trú og heiður skrivar undir váttan, hvørji álitsstørv, sum nevnd eru í stýrisskipanarlógini § 8, hann hevur, og at hann játtar, at hann leggur nú hesi álitsstørv frá sær.

**§ 7.** Aldursformaðurin lýsir nú løgtingið at vera sett.

### Val av løgtingsformanni og næstformonnum

**§ 8.** Løgtingið velur løgtingsformann og tríggjar næstformenn.

**§ 9.** Á sama fundi, løgtingið er sett, biður aldursformaðurin tingmenn um uppskot til løgtingsformann.
*Stk. 2.* Uttan at hava umrøðu og nevndarviðgerð verður síðan atkvøðugreiðsla sbrt. reglunum í § 78, stk. 3, á sama fundi um at velja løgtingsformann.

**§ 10.** Flokkarnir, sum umboðaðir eru á løgtingi, uttan flokkurin, løgtingsformaðurin er úr, tilnevna eftir

stødd tingmann til 1., 2. og 3. næstformann. Stendur á jøvnum, ræður lutakast.

**§ 11.** Boða fýra fimtingar av tinginum løgtingsformanninum skrivliga frá, at teir krevja nýggjan formansskap valdan eftir reglunum í stýrisskipanarlógini § 9, stk. 3, fer løgtingsformaðurin úr formanssessinum alt fyri eitt.

**§ 12.** Aldursformaðurin á tingi, sbr. § 2, tekur tá formanssæti bara við tí starvi at skipa fyri at velja nýggjan formansskap eftir reglunum í § 9 og § 10.

**§ 13.** Um so er, at løgtingsformaðurin ella ein av næstformonnunum sjálvboðin leggur frá sær ella doyr í valskeiðnum, verður nýval til henda sess eftir reglunum í § 9 ella § 10. Kemur løgtingsformaðurin nú úr øðrum flokki enn tann fráfarni, verða næstformanssessirnir umskipaðir, so teir samsvara § 10.

## Formansskapur Løgtingsins

**§ 14.** Formansskapur løgtingsins er hitt hægra fyriskipaða stýrið í løgtinginum og umboðar tingið úteftir. Formansskapurin skal tryggja, at løgtingsumsitingin virkar væl og tíðarhóskandi í allar mátar.
*Stk. 2.* Umframt viðger formansskapurin ítøkilig mál, ið sbrt. tingskipanini skulu leggjast fyri formansskapin, mál av grundregluligum týdningi og/ella stórum týdningi, og mál, sum annars skulu verða viðgjørd eitt nú:

1) Hægri fyriskipaðum spurningum løgtingsarbeiðinum viðvíkjandi,
2) lønarviðurskiftum løgtingsmanna sbrt. stýrisskipanarlógini § 25,
3) spurningum, um tingmaður í valskeiðnum hevur mist valbæri sítt og tí má siga tingsessin frá sær sbrt. stýrisskipanarlógini § 6, stk. 4,
4) spurningum um at taka óárinið frá løgtingsmanni sbrt. stýrisskipanarlógini § 24.

**§ 15.** Løgtingsformaðurin og næstformenninir mynda formansskap løgtingsins. Fyri limirnar í formansskapinum eru eingir varalimir.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin miðar eftir, at avgerðir í formansskapinum verða tiknar einmæltar, men ber hetta ikki til, verður atkvøtt. Stendur á jøvnum, ger formansins atkvøða munin.
*Stk. 3.* Gerðabók verður skrivað frá hvørjum fundi.

**§ 16.** Løgtingsformaðurin hevur vegna formansskapin yvireftirlitið við, at ongar útreiðslur verða hildnar av løgtinginum sum stovni, ið ikki hava heimild í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

## Løgtingsformaður

**§ 17.** Formaðurin ansar eftir, at arbeiði løgtingsins verður væl fyriskipað og úr hondum greitt.
*Stk. 2.* Formaðurin stýrir umrøðum løgtingsins og ansar eftir, at alt er í góðum skili, og at viðgerðin er virðilig. Løgtingsmaður skal geva seg undir avgerð formansins.

**§ 18.** Í forføllum formansins gongur næstformaður fult í hansara stað.

**§ 19.** Løgtingsformaðurin varðveitir heimildir sínar eftir løgtingsval, til nývalt løgting kemur saman eftir reglunum í stýrisskipanarlógini § 9.

## Stjóri tingsins

**§ 20.** Formansskapur Løgtingsins setir í starv og loysir úr starvi stjóra Løgtingsins.

**§ 21.** Stjórin kann ikki vera løgtingsmaður ella hava størv og álitisstørv í almennari tænastu ella borgarligari vinnu uttan samtykki formansskapsins.

**§ 22.** Stjórin ella starvsfólk, sum hann tilnevnir til tað, hevur um hendi hesi størv:
- Undir ábyrgd formansins at skriva gerðabók Løgtingsins sbrt. § 74,
- er ráðgevi løgtingsformansins í øllum løgfrøðiligum og øðrum spurningum,
- er dagligur leiðari í umsiting Løgtingsins og setir í starv og loysir úr starvi starvsfólkini í umsiting tingsins,
- er skrivari hjá føroysku sendinevndunum við løgtingsmonnunum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum,

- er skrivari og løgfrøðiligur ráðgevi hjá løgtingsnevndum,
- ansar eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt, og
- er løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkunum og tingmonnum

## KAP. II LØGTINGSNEVNDIR

**§ 23.** Tá ið løgtingsformaður er valdur, setir hann á dagsskrá til næsta løgtingsfund tey nevndarval, sum umrødd eru í § 24. Nevndarvalið fer fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sbrt. løgtingsvallógini eftir floksstødd ella í valbólkum.
*Stk. 2.* Um so er, at løgmanstilnevning skal verða eftir løgtingsvalið, verður nevndarval tó ikki sett á skránna fyrr enn fyrsta løgtingsfund eftir fundin, løgmaður varð tilnevndur, uttan so er, at serligar umstøður gera tað neyðugt, at ávísar nevndir verða valdar fyri henda fund.

**§ 24**. Á hesum fundi verða hesar nevndir valdar:
Fíggjarnevnd við 7 limum og 7 varalimum. Hon hevur eftir áheitan frá landsstýrismanninnum í fíggjarmálum heimild at ráðgeva honum um broyttar fortreytir fyri játtanini. Hon røkir sítt starv sbrt. § 44, stk. 2 í stýrisskipanarlógini og gevur annars løgtinginum tilmæli í fíggjar-, búskapar-, skatta- og avgjaldsmálum.
Uttanlandsnevnd við 7 limum og 7 varalimum. Hon røkir sítt starv sbrt. § 54 í stýrisskipanarlógini og gevur løgtinginum tilmæli í øllum uttanlands-, marknaðar- og verjumálum, eisini um viðurskiftini við Danmark.
Landsstýrismálanevnd við 3 limum og 3 varalimum. Hon røkir sítt starv sbrt. § 38 í stýrisskipanarlógini. Hon hevur heimild at boðsenda løgmanni ella landsstýrismanni at koma á fund at greiða frá ávísum máli.
Vinnunevnd við 7 limum og 7 varalimum.
Trivnaðarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
Mentanarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
Rættarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
*Stk. 2.* Løgtingmál fáa vanliga viðgerð í nevnd soleiðis, at samsvar er millum ta viðgerð, málið hevur fingið ella hevði fingið í landsumsitingini, og viðgerðina í Løgtinginum.
*Stk. 3.* Fíggjarnevndin kann vísa teim táttum í fíggjarlógaruppskotinum, sum snúgva seg um málsøki hjá aðrari nevnd, til ummælis hjá hesum nevndum. Hetta skal gerast, áðrenn ein vika er liðin frá tí, at málið er beint í fíggjarnevndina, og skulu nevndirnar senda fíggjarnevndini sítt ummæli í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tær hava fingið málið til ummælis. Fíggjarnevndin kann eisini undir viðgerðini av eykajáttanarløgtingslógum í serligum førum senda uppskotið ella part av tí til ummælis sbrt.1. pkt., tó skal nevndin í slíkum føri geva sítt ummæli í seinasta lagi eina viku eftir, at hon hevur fingið málið til ummælis.
*Stk. 4.* Løgtingsnevndirnar kunnu bara taka til viðgerðar tey mál, sum sbrt. avgerð løgtingsformansins eftir § 40 og § 43 eru beind nevndini til viðgerðar.
*Stk. 5.* Um í minsta lagi 5 limir ynskja tað, kunnu nevndirnar, hóast regluna í stk. 4, seta løgmanni ella landsstýrismanni spurningar um ávís viðurskifti. Spurningarnir verða settir skrivliga, og nevndin kann biðja um skrivligt svar, ella at løgmaður ella landsstýrismaðurin kemur á fund við nevndina at svara spurningunum. Er eingin freist ásett, eiga spurningarnir at verða svaraðir innan 2 vikur eftir, at teir eru settir. Sær løgmaður ella landsstýrismaður seg ikki føran fyri at svara, skal hann skjótast tilber við skrivligari grundgeving boða nevndini frá hesum.

**§ 25.** Løgtingið kann seta aðrar løgtingsnevndir enn tær, sum nevndar eru í § 24, at geva løgtinginum tilmæli í ávísum málum. Hesar nevndir sita bara, til nevndin hevur avgreitt setning sín og í ongum føri longri enn, til tingsetan endar.
*Stk. 2.* Nevndir, sum settar verða sbrt. stýrisskipanarlógini § 19, sita, til tær hava avgreitt setning sín tó ikki longur enn til, at løgtingsval hevur verið.

**§ 26.** Løgtingsnevndir, umrøddar í § 24, sita alt valskeið løgtingsins, uttan so er, at tingið við atkvøðugreiðslu eftir áheitan frá tingmanni ger av at velja nevndirnar av nýggjum.
*Stk. 2.* Verður nevndarsessur leysur av tí, at nevndarlimur gerst løgmaður, landsstýrismaður ella fer frá av aðrari orsøk, tilnevnir tann bólkur, sum í lutfalsvalinum tilnevndi fráfarandi nevndarlimin, nýggjan nevndarlim í staðin. Sama er galdandi, tá onnur val hava samband við, at nevndarlimur gerst løgmaður,

landsstýrismaður ella av aðrari orsøk leggur tingsessin frá sær. Tekur løgmaður ella landsstýrismaður aftur sæti á tingi í valskeiðnum, kann bólkurin, ið tilnevndi fráfarna nevndarlimin, tilnevna nýggjan nevndarlim ístaðin.

**§ 27.** Løgtingsmenn hava skyldu at taka við nevndarvali.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin kann tó ikki verða valdur limur í løgtingsnevnd. Løgtingsformaðurin kann tó verða valdur í nevndir, settar sbrt. § 25 at viðgera viðurskifti løgtinginum viðvíkjandi

**§ 27 a.** Varamaður, sum tekur sæti á tingi fyri tingmann í farloyvi, tekur við teim nevndarsessum, sum tingmaðurin hevur sæti í. Hetta er ikki galdandi fyri uttanlandsnevndina og landsstýrismálanevndina, har varamaðurin sbrt. § 24, stk. 1 møtir fyri nevndarlim í farloyvi.

**§ 28.** Innan 3 løgtingsfundardagar, eftir at løgtingsnevnd er vald, boðar fyrst valdi nevndarlimur nevndini til fundar.
*Stk. 2.* Á hesum fundi velur nevndin sínámillum formann og næstformann eftir lutfalsvalháttinum sbr. løgtingsvallógini floksstødd ella í valbólkum.
*Stk. 3.* Nevndin kann í valskeiðnum gera av at velja nýggjan formansskap í nevndini.

**§ 29.** Nevndarformaðurin stýrir nevndarfundunum.
*Stk. 2.* Hevur formaðurin forfall, tekur næstformaðurin við størvum formansins, eisini í teim førum, tá ið varamaður tekur sæti fyri formannin.
*Stk. 3.* Um so er, at stjórin ella tann, hann tilnevnir, hevur forfall, skrivar formaðurin ella ein, hann tilnevnir, gerðabók nevndarinnar og skrivar uppskot til álit.

**§ 30.** Nevndarformaðurin í løgtingsnevnd boðar nevndarlimunum til fundar við í minsta lagi 18 tíma freist samstundis, sum hann sigur frá dagsskránni fyri fundin. Fundartíð og –skrá verður almannakunngjørd.
*Stk. 2.* Undir serliga átrokandi umstøðum og treytað av, at allir nevndarlimirnir eru samdir, ber til at víkja frá tíðarfreistini ella áseta aðra fundarskrá. Fundurin verður kunngjørdur sambært reglunum í stk. 1.
*Stk. 3.* Løgtingsmaður, sum ikki er nevndarlimur í nevndunum sambært § 24, stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6 og 7 og § 25, hevur heimild at møta á fundum í hesum nevndum sum eygleiðari. Løgtingsformaðurin og varamenninir í ávikavist uttanlandsnevndini og landsstýrismálanevndini hava eisini rætt at møta sum eygleiðarar í hesum báðum nevndunum. Harumframt hevur umboð fyri flokk, sum ikki hevur umboð í uttanlandsnevndini, rætt at senda eygleiðara á fund í nevndini. Eygleiðara er ikki loyvt at taka orðið á fundunum, at fáa skrivað sjónarmið í gerðabókina ella í álitið. Hann skal annars geva seg undir somu reglur, sum galdandi eru fyri nevndarlimir.

**§ 31.** Skrivað verður í gerðabók um virksemið hjá hvørjari einstakari løgtingsnevnd. Á næsta fundi verður gerðabókin løgd fram til góðkenningar.

**§ 32.** Tað áliggur nevndarformanninum at gera nevndararbeiðið skjótast gjørligt. Løgtingsformaðurin kann altíð krevja skrivliga ella munnliga frágreiðing frá nevndarformanninum um, hvussu gongst við arbeiði nevndarinnar.
*Stk. 2.* Nevnd, sum mál er beint í, skal lata løgtinginum álit í seinasta lagi 1 mánað eftir, at hon fekk málið beint frá formanninum. Álit um uppskot landsstýrisins til løgtingsfíggjarlóg skal tó verða latið løgtinginum í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at uppskotið var beint í fíggjarnevndina. Løgtingsformaðurin kann leingja frestina eftir áheitan frá nevndarformanni.
*Stk. 3.* Um so er, at álit ikki er framlagt innan frestina, nevnd í stk. 2, er tingmanni heimilað skrivliga at krevja, at formaðurin setir spurningin til atkvøðugreiðslu, um tingviðgerðin skal halda fram, hóast einki álit er latið.

**§ 33.** Nevndarformaðurin kann við samtykki stjórans útvega nevndini lønta, serkøna hjálp út yvir ta hjálp, sum umsiting tingsins veitir.

**§ 34.** Tá ið nevndarformaðurin heldur, at sjónarmiðini hjá nevndarlimunum eru lýst til fulnar, og allar upplýsingar fingnar til vega, verður álit skrivað.
*Stk. 2.* Nevndarformaðurin stílar fyri, at álit verður skrivað. Hann ansar eftir, at broytingaruppskot eru

sambærilig við upprunauppskotið.
*Stk. 3.* Meirilutin ella minnilutin í nevndini kann lata formanninum skrivligt uppskot um álit.
*Stk. 4.* Nevndin umrøður nú alt álitið frá samdari nevnd, meiriluta og minniluta, og ger møguligar broytingar. Allir nevndarlimirnir skriva undir álitið, sum síðani verður handað løgtingsformanninum.
*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 4, 2. pkt., kann nevndarálit verða handað løgtingsformanninum, tá meirilutin av nevndini hevur skrivað undir tað.

## KAP. III TINGMÁL

**§ 35.** Sbrt. stýrisskipanarlógini § 15 er bara løgmanni, landsstýrismanni ella løgtingsmanni heimilað at leggja fram mál fyri tingið.

### Løgtingslógaruppskot

**§ 36.** Løgtingslógaruppskot skulu sbrt. stýrisskipanarlógini § 15, stk. 2, hava 3 viðgerðir á tingi.

**§ 37.** Løgtingslógaruppskot skulu hava lógarsnið og skulu hava eitt heiti, sum sigur stutt, hvat í uppskotinum stendur.
*Stk. 2.* Í stórum løgtingslógaruppskotum skal uppskotið verða býtt í hóskandi kapittul við yvirskrift, sum sigur frá tí, ið kapitlinum stendur. Í løgtingslógaruppskotum skulu ikki vera ov langir setningar, og skulu løgtingslógaruppskotini vera býtt í hóskandi greinir og stk.
*Stk. 3.* Í viðmerkingunum til lógaruppskot skulu verða hesar viðmerkingar:

**1. Almennar viðmerkingar**, t.v.s.
a) Frágreiðing um galdandi lóggávu og upplýsingar um, hvussu hevur verið, og kann verða funnist at henni,
b) ein stuttur samandráttur av nýskapanini við uppskotinum,
c) hvør fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum,
d) hvørjir almennir stovnar ella aðrir hava havt uppskotið til ummælis, og hvørjar viðmerkingar teirra hava verið, og

**2. Serligar viðmerkingar**, har greitt verður frá innihaldinum av hvørjari einstakari grein í uppskotinum. Eisini skal her verða greitt frá ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast.

**§ 38.** Løgtingslógaruppskot er framlagt, tá løgtingsformaðurin boðar frá tí av tingsins røðarapalli. Endaligt orðað uppskot skal vera formanninum í hendi í seinasta lagi 3. yrkadagin fyri framløgufundin. Tó skulu uppskot, sum verða løgd fram seinasta framløgudag eftir § 54 verða formanninum í hendi í seinasta lagi 6. yrkadagin frammanundan. Løgtingsformaðurin kann í heilt serligum føri gera frávik frá ásetingini í 2. og 3. pkt., men skulu ongantíð ganga minni enn 2 tímar frá tí, at formaðurin hevur endaligt orðað uppskot í hendi, til tað kann leggjast fram á tingfundi.

**§ 39.** Uppskot kann fáa 1. viðgerð 2. yrkadagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð verður uppskotið umrøtt í síni heild. Broytingaruppskot kann verða fráboðað og umrøtt.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin kann gera av, at tvey ella fleiri løgtingslógaruppskot eru til 1. viðgerð í senn.

**§ 40.** Løgtingsformaðurin ger av, um mál skal verða beint í nevnd við 1. viðgerð.
*Stk. 2.* Mæla 6 tingmenn til tess, hevur løgtingsformaðurin skyldu at beina mál í nevnd.
*Stk. 3.* Løgtingsformaðurin ger av hvørja nevnd, mál skal beinast í, sbr. tó § 24, stk. 2.

**§ 41.** 2. viðgerð kann verða 3. yrkadagin eftir, at 1. viðgerð endaði, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram.
*Stk. 2.* Tá ið uppskot er til 2. viðgerð, verður tað umrøtt í síni heild, einstakar greinir, broytingaruppskot og nevndarálit.
*Stk. 3*. Løgtingtingsformaðurin kann gera av, at tvey ella fleiri lógaruppskot eru til 2. viðgerð ísenn, tó skal atkvøðast um hvørt málið sær.
*Stk. 4.* Tingmaður kann seta broytingaruppskot skrivliga fram, men skal tað verða gjørt, áðrenn orðaskiftið við 2. viðgerð er byrjað. Nevndin, meiriluti ella minniluti í henni kann eisini seta

broytingaruppskot skrivliga fram, eftir at 2. viðgerð er byrjað, men áðrenn orðaskiftið er endað.
*Stk. 5.* Eftir umrøðuna við 2. viðgerð verður atkvøtt um broytingaruppskot og upprunauppskot eftir reglunum í § 75. Síðan fer uppskotið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

**§ 42.** 3. viðgerð kann vera 2. yrkadagin eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram.
*Stk. 2.* 4 tingmenn kunnu í felag skrivliga seta fram broytingaruppskot, ella er málið sbr. § 43 beint í nevnd við 2. ella 3. viðgerð, so kann meiriluti ella minniluti í nevndini skrivliga seta fram broytingaruppskot.
*Stk. 3.* Broytingaruppskot kann leggjast fram við 3. viðgerð, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verða broytingaruppskot og tær greinir, broytingaruppskotið viðvíkir, umrøddar fyrst og koma fyrst til atkvøðugreiðslu.
*Stk. 4.* So verður endalig viðgerð, og tingið samtykkir ella fellur løgtingslógaruppskotið.

**§ 43.** Við 2. og 3. viðgerð beinir formaðurin ikki málið í nevnd, uttan at løgtingið samtykkir at beina málið í nevnd. § 40, stk. 3, er galdandi á sama hátt í hesum førum.
*Stk. 2.* Samtykkir løgtingið at beina málið aftur í nevnd, verður tað gjørt, eftir at orðaskiftið í hesum umfari er at enda.
*Stk. 3.* Tá ið málið kemur aftur úr nevnd, heldur viðgerðin fram á sama viðgerðarstigi, sum tað fekk, tá ið tað varð beint aftur í nevnd. Talutíðirnar vera tó sum ávíkavist undir 2. og 3. viðgerð.
*Stk. 4.* Formaðurin kann seta málið á dagsskrá til framhaldandi viðgerð, hóast ásetingarnar í § 41, stk. 1.

**§ 44.** Innan 12 yrkadagar eftir tað, at løgtingslógaruppskotið er endaliga samtykt, sendir løgtingsformaðurin løgmanni skrivliga fráboðan um samtyktina.

### Uppskot til ríkislógartilmæli

**§ 45.** Reglurnar í § 36 - § 44 verða á sama hátt nýttar, tá ið ríkislógartilmælisuppskot eru til viðgerðar.

### Løgmanstilnevning og misálit á løgmann ella landsstýrismann

**§ 46.** Løgtingsformaður leggur á løgtingsfundi eftir reglunum í stýrisskipanarlógini § 28 fram uppskot at velja løgmann. Atkvøtt verður um uppskotið eftir reglunum í somu grein. Tað verður ikki umrøtt.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin ger av, nær atkvøðugreiðsla skal verða. Slík atkvøðugreiðsla kann tó eftir stýrisskipanarlógini § 28, stk. 3 og 4, ikki vera seinni enn 4. yrkadagin eftir framløgu, og er uppskot til løgmansevni fyrr felt, tá sama dag.

**§ 47.** Uppskot um misálitisváttan á løgmann ella landsstýrismann sbrt. stýrisskipanarlógini § 29, stk. 2, og § 30 skal verða lagt fram skrivliga á løgtingsfundi.
*Stk. 2.* Skráin fyri løgtingsfundin verður tá alt fyri eitt broytt soleiðis, at hetta mál verður sett á skránna at vera næsta mál á sama fundi, og verður, tá umrøðan endar, farið beinleiðis til endaliga atkvøðugreiðslu í málinum. § 61, stk. 4, er ikki galdandi í hesum førum.

### Uppskot til samtyktar

**§ 48.** Sum uppskot til samtyktar verða viðgjørd:
1) Mál, tá ið løgtingið ger av at skriva út nýval sbrt. stýrisskipanarlógini § 6, stk. 2,
2) spurningur, um tingmaður í valskeiðnum hevur mist valbæri sítt sbrt. stýrisskipanarlógini § 7,
3) mál at taka óárinið frá tingmanni sbrt. stýrisskipanarlógini § 24,
4) mál at góðkenna landskassaroknskapir sbrt. stýrisskipanarlógini § 45, stk. 3,
5) mál at góðkenna millumtjóðasáttmálar sbrt. stýrisskipanarlógini § 52, stk. 2,
6) mál, tá ið heitt verður á landsstýrið at leggja fram ávíst løgtingslógaruppskot ella ríkislógartilmælisuppskot og mál viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni og millumlanda viðurskiftum.
7) mál, tá ið løgtingið skal taka støðu til, um ákæra skal verða reist ímóti løgmanni ella landsstýrismanni fyri at hava brotið løgtingslógina um ábyrgd landsstýrismanna.

*Stk. 2.* Somuleiðis fáa øll onnur sjálvstøðug uppskot, sum verða løgd fram á løgtingi, viðgerð sum uppskot til samtyktar, ásetir tingskipanin ikki annan viðgerðarhátt.

**§ 49.** Uppskot til samtyktar fær á løgtingi tvær viðgerðir og verður endaliga samtykt ella felt við 2.

viðgerð.
*Stk. 2.* Uppskot til samtyktar fáa viðgerð eftir reglunum í § 35 og § 38 - § 41.

### At velja fólk

**§ 50.** Tá ið løgtingið skal velja fólk, eitt ella fleiri, biður formaðurin munnliga um uppskot, og tá ið uppskot eru framkomin, verður eingin umrøða, men á sama fundi síðani farið til endaliga atkvøðugreiðslu í málinum.
*Stk. 2.* Um so er, at 6 tingmenn mæla til tess, verður ikki atkvøtt um evnini á sama fundi, sum tey eru skotin upp, men seinni á einum fundi, sum løgtingsformaðurin hevur ásett.

### Frágreiðingar frá løgmanni ella landsstýrismanni, skrivligir og munnligir fyrispurningar

**§ 51.** Eftir ólavsøkufrágreiðing løgmans sbrt. stýrisskipanarlógini § 12, stk. 1, um støðu landsins og tí, ið landsstýrið hevur í hyggju at fremja, verður tingumrøða, áðrenn 6 yrkadagar eru lidnir, við støði í røðu løgmans.
*Stk. 2.* Reglurnar í stk. 1 verða á sama hátt nýttar, ætlar løgmaður í øðrum førum at geva løgtinginum frágreiðing um støðu landsins og um tað, ið landsstýrið hevur ætlan um at fremja.
*Stk. 3.* Um so er, at løgmaður uttan um skránna ætlar at geva løgtinginum serliga fráboðan, verður sagt formanninum frá. Formaðurin gevur løgmanni orðið beinanvegin ella seinni á sama fundi.
*Stk. 4.* Eftir reglunum í stk. 1 kann eisini landsstýrismaður geva løgtinginum frágreiðing um støðuna í máli, sum er málsøki hansara, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja hesum viðvíkjandi.

**§ 52.** Løgtingsformaðurin setir regluliga á dagsskrá: Munnligar fyrispurningar til løgmann ella landsstýrismenn.
*Stk. 2.* Á hesum fundum kunnu løgtingsmenn uttan loyvi løgtingsins seta løgmanni ella landsstýrismanni stuttar munnligar fyrispurningar um almenn viðurskifti, sum eru stutt og nágreiniliga orðaðir, og sum teir í seinasta lagi dagin fyri hava boðað løgtingsformanninum og løgmanni ella landsstýrismanninum frá. Løgtingsformaðurin kann, um sami spurningur verður settur av fleiri tingmonnum, gera av, at spurningarnir verða viðgjørdir undir einum. Í slíkum føri fáa allir spyrjarar talutíð sum spyrjari.
*Stk. 3.* Løgmaður ella landsstýrismaður svarar so aftur munnliga á sama fundi, men kann eisini uttan aðra grundgeving biðja spyrjaran seta spurningin fram av nýggjum eftir reglunum um skrivligar fyrispurningar í § 53. Í hesum føri steðgar orðaskifti beinanvegin.
*Stk. 4.* Á sama hátt kann løgtingsmaður á slíkum fundum seta nevndarformanni í løgtingsnevnd fyrispurning um, hvussu gongst at viðgera ávíst mál, sum beint er nevndini, men sum einki álit er latið í enn.
*Stk. 5.* Løgtingsformaðurin setir regluliga ófráboðaðar spurningar til løgmann og landsstýrismenn á dagsskránna. Løgtingsmenn kunna tá uttan fráboðan seta løgmanni og landsstýrismonnum spurning, sum teir skulu svara beinanvegin. Løgmaður og landsstýrismaður kunnu boða frá, at teir ikki fáa svarað beinanvegin, men vísa spyrjaranum til at seta spurningin fram av nýggjum eftir stk. 2 og 3 ella § 53. Í hesum førum steðgar orðaskiftið beinanvegin.
*Stk. 6.* Løgtingsmaður kann bert seta fram ein høvuðsspurning. Ófráboðaðir spurningar kunnu í mesta lagi vara tilsamans 1 tíma og, hvør spurningur má í mesta lagi vara í 10 minuttir.

**§ 52a.** Tingmenn kunnu seta løgmanni og landsstýrismonnum skrivligar spurningar, sum ikki eru settir á annan hátt, um almenn viðurskifti.
*Stk. 2.* Spurningurin skal vera stutt og greitt orðaður, og møguligar viðmerkingar skulu vera stuttar og greiðar. Spurningurin verður umvegis umsiting tingsins latin formanninum, sum sendir spurningin til løgmann ella avvarðandi landsstýrismann.
*Stk. 3.* Spurningar kunnu ikki setast millum jóansøku og ólavsøku, eftir at val er skrivað út, ella eftir at landsstýrið hevur lagt frá sær, jvb. § 31 í stýrisskipanarlógini.
*Stk. 4.* Svarast skal í seinasta lagi 10 yrkadagar eftir, at spurningurin er latin inn. Svarið skal vera stutt og greitt orðað. Løgmaður og landsstýrismenn kunnu við skrivligari grundgeving boða frá, at spurningur verður ikki svaraður.

**§ 53.** Vil tingmaður fáa ávíst alment mál til umrøðu og í hesum sambandi leggur skrivliga nágreiniliga orðaðan spurning fyri løgmann ella landsstýrismann, sbrt. reglunum í stýrisskipanarlógini § 21, verður áheitan við grundgeving handað formanninum. Formaðurin sigur tinginum frá á sama ella næsta fundi.

*Stk. 2.* Á næsta fundi eftir fráboðan formansins ger tingið av við atkvøðugreiðslu uttan umrøðu, um fyrispurningurin skal verða svaraður. Verður uppskotið ikki samtykt, telur tingformaðurin, um tveir fimtingar av tingmonnum á fundi hava atkvøtt fyri, og skal fyrispurningurin tá verða svaraður eftir reglunum í stýrisskipanarlógini § 21, hóast hann er fallin. Skal hann verða svaraður, sendir formaðurin løgmanni ella landsstýrismanninum fyrispurningin.
*Stk. 3.* Fyrispurningurin skal verða svaraður skrivliga, og skal løgtingsformaðurin hava svarið í hendi í seinasta lagi 14 yrkadagar eftir, at spurningurin var góðkendur sbrt. stýriskipanarlógini § 21. Løgtingsformaðurin kann í serligum føri gera av, at svarfreistin skal gerast styttri.
*Stk. 4.* Løgtingsformanninum er heimilað, tá ið hann hevur umrøtt málið við spyrjara og spurda, at gera av at bíða við at svara og viðgera fyrispurningin, krevja landsins áhugamál, at spurningurin verður ikki alment umrøddur innan frestina, ella um svarið til fyrispurningin krevur so gjølligt fyrireikingararbeiði hjá tí spurda, at hann er ikki førur fyri at greiða svarið innan frestina.
*Stk. 5.* Tingmaður kann seta ríkisumboðsmanninum fyrispurning viðvíkjandi máli, sum hoyrir undir málsræði ríkisins. Ríkisumboðsmaðurin boðar løgtinginum frá, um og nær fyrispurningurin verður svaraður.

## Frestir, afturtøka og at vísa burtur tingmál

**§ 54.** Uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar skulu, fyri at verða viðgjørd, verða framløgd innan 8. mars. Uppskot til játtanarkarmar fyri fíggjarlógini komandi ár skal tó verða lagt fram innan 1. apríl. Uppskot til løgtingslógir, sum skulu fáa gildi 1. januar, skulu leggjast fram innan 5. november.
Áðrenn tingsetan endar, kann løgtingsformaðurin áseta seinastu freist at seta fram fyrispurning eftir § 53.
*Stk. 2.* Hevur uppskot skrivliga átekning frá 17 tingmonnum ella fleiri, har teir viðmæla, at uppskotið kemur til viðgerðar, kann mál tó verða lagt fram og fáa viðgerð eftir frestina í stk. 1.

**§ 55.** Uppskotssetarin kann taka aftur uppskot á øllum viðgerðarstigum.
*Stk. 2.* Spyrjari kann taka skrivligan fyrispurning aftur, tó í seinasta lagi áðrenn viðgerðin av honum byrjar.
*Stk. 3.* Beint eftir, at boðað er tinginum frá afturtøku, spyr løgtingsformaðurin, um annar løgtingsmaður, løgmaður ella landsstýrismaður tekur upp aftur uppskotið ella skrivliga fyrispurningin. Um so er, verður uppskotið ella skrivligi fyrispurningurin viðgjørdur á tí stigi, sum tey eru komin til.

**§ 56.** Uppskot kann ikki verða broytt á sama fundi, sum tað er samtykt.
*Stk. 2.* Hevur tingið avgerandi samtykt ella felt løgtingslógaruppskot, ríkislógartilmælisuppskot ella uppskot til samtyktar, kann tað ikki verða tikið til nýggja viðgerð í somu tingsetu, uttan so er, at løgtingið loyvir framløgu.

**§ 57.** Løgtingsformaðurin skal, eftir at hava fingið samtykki frá formansskapinum sbrt. § 15, mæla løgtinginum til at vísa burtur hesi uppskot:
1) Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli, sum gongur í móti stýrisskipanarlógini ella tingskipanini.
2) Uppskot til løgtingssamtykt, sum eftir orðing síni áleggur ella skyldubindur landsstýrið at leggja fyri løgtingið løgtingslógaruppskot ella uppskot til ríkislógartilmæli. Uppskot til løgtingssamtykt, har heitt verður á landsstýrið um at leggja fram løgtingslógaruppskot ella ríkislógartilmælisuppskot, verða ikki burturvíst.
3) Uppskot til løgtingssamtykt, sum áleggur, tilmælir ella heitir á landsstýrið at útinna fyrisitingina ella heimildir sínar eftir stýrisskipannarlógini § 51, § 52, § 53 ella § 54 á ávísan gjølligari útgreindan hátt. Tó kann verða heitt á landsstýrið um at kanna ávíst mál og leggja frágreiðing fyri løgtingið. Eisini er loyvt at heita á landsstýrið sbrt. § 48, stk. 1, nr. 6.
4) Uppskot til løgtingssamtykt, sum av røttum eftir innihaldi sínum eigur at verða orðað sum uppskot til løgtingslóg ella uppskot til ríkislógartilmæli.

*Stk. 2.* Løgtingið atkvøður eftir vanligum atkvøðureglum á sama løgtingsfundi, sum løgtingsformaðurin tilmælir burturvísing, uttan umrøðu, um málið skal verða burturvíst.
*Stk. 3.* Onnur uppskot enn tey, sum nevnd eru í stk. 1, kunnu eftir uppskoti frá løgtingsformanninum ella løgtingsmanni verða burturvíst, um so er, at áheitan um hetta verður sett fram, áðrenn uppskotið verður umrøtt, og tríggir fimtingar av allari tingmanningini atkvøða fyri burturvísing.

**§ 58.** Samsvarandi stýrisskipanarlógini § 15, stk. 3 falla burtur øll uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir, sum ikki eru endaliga samtykt fyri nýval, ella tá ið tingsetan er endað.

## KAP. IV FUNDARSKIPAN

**§ 59.** Sbrt. stýrisskipanarlógini § 13 boðar løgtingsformaðurin til løgtingsfundar og kunnger samstundis dagsskrá.
*Stk. 2.* Formaðurin hevur eftir somu grein skyldu at boða til fundar og ikki dvølja óneyðugt, um so er, at í minsta lagi tveir fimtingar av tingmonnunum ella løgmaður skrivliga biðja um tingfund við dagsskrá.
*Stk. 3.* Løgtingið kann eftir uppskoti frá 6 løgtingsmonnum samtykkja aðra skrá enn skránna, løgtingsformaðurin hevur ásett fyri ávísan tingfund.

**§ 60** Løgtingsfundir og nevndarfundir verða ikki hildnir sunnu- og halgidagar (ólavsøkudagur undantikin) og yrkadagar eftir kl. 22.00, uttan so er, at serligar umstøður gera tað neyðugt.

**§ 61.** Tá ið løgtingsfundur endar, boðar løgtingsformaðurin vanliga frá, nær næsti løgtingsfundur verður og frá skránni.
*Stk. 2.* Í teim førum, tá ið løgtingsfundur er ikki fráboðaður á løgtingsfundi, boðar løgtingsformaðurin frá fundinum og dagsskránni fyri fundin í almennari lýsing.
*Stk. 3.* Í slíkari lýsing kann løgtingsfundur ikki verða fráboðaður við styttri freist enn, at allir tingmenn skulu hava møguleika at koma til tings.
*Stk. 4.* Dagsskrá til løgtingsfund, sum ásettur er sbrt. stk. 1 og 2, ella broyting í dagsskránni sbrt. § 59, stk. 3, kann ikki verða broytt, uttan at broytingin í dagsskránni er kunngjørd dagin fyri fundin. Formaðurin kann altíð uttan nakra aðra freist taka mál av skránni.
*Stk. 5.* Á síðsta løgtingsfundardegi í viku verður, um gjørligt, kunngjørd fyribilsskrá fyri tingarbeiðið komandi dagarnar.

**§ 62.** Doyr løgtingsmaður, ella leggur hann frá sær, tekur varamaður sæti á tingi fyri hann eftir § 34 í vallógini.
*Stk. 2.* Í teim førum, tá ið løgtingsmaður gerst løgmaður ella landsstýrismaður og tí noyðist at siga sessin frá sær sbrt. stýrisskipanarlógini § 32, stk. 1, tekur hann tó sessin aftur, fer hann úr landsstýrinum, áðrenn valskeið løgtingsins er at enda.

**§ 63.** Eftir áheitan frá tingmanni kann tingið loyva honum farloyvi. Farloyvistíðin er í minsta lagi 7 dagar. Avgerð tingsins verður tikin uttan umrøðu eftir munnligum tilmæli frá formanninum.
*Stk. 2.* Varamaðurin leggur frá sær, tá ið tingmaðurin sigur formanninum frá, at hann møtir aftur á tingfundi.

**§ 64.** Løgtingsfundir eru almennir sbrt. stýrisskipanarlógini § 17.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin ella 6 løgtingsmenn kunnu krevja, at áhoyrararnir skulu út úr tingsalinum, meðan løgtingið viðger, um fundur skal vera fyri afturlatnum durum.
*Stk. 3.* Løgtingið tekur síðan støðu til, um fundur skal verða fyri afturlatnum durum.
*Stk. 4.* Tann, sum sigur frá, hvat fyrifórst á løgtingsfundi fyri afturlatnum durum, ella ikki við rætti nýtir upplýsingar, fingnar á slíkum fundi, verður revsaður eftir borgaraligu revsilógini § 152.

**§ 65.** Løgtingsformaðurin skipar fyri, at áhoyrarar órógva ikki.
*Stk. 2.* Órógvar áhoyrari, kann formaðurin vísa honum, ella eru umstøðurnar so, øllum áhoyrarum út úr tingsalinum.

**§ 66.** Tingmaður, ið hevur fingið orðið, skal tala av talarastólinum ella eftir formansins avgerð úr sessinum í tingsalinum

**§ 67.** Tingmaður skal altíð venda røðu sína til formansins.

*Stk. 2.* Verður tingmaður ella landsstýrismaður nevndur í røðu, eigur hann at verða nevndur bæði við fornavni og eftirnavni. Løgmaður eigur at verða nevndur løgmaður.

**§ 68.** Endurgeving kann bara verða nýtt avmarkað.Verður endurgivið úr øðrum enn tí, sum er til viðgerðar, krevst loyvi formansins.
*Stk. 2.* Greitt skal verða tilskilað, nær ið endurgeving byrjar, og nær endurgeving endar.
*Stk. 3.* Somuleiðis skal verða sagt frá, hvaðan endurgevingin er, og hvar endurgevingin stendur.

**§ 69.** Tá mál kemur til 1.viðgerð, og frágreiðingar frá løgmanni og landsstýrismonnum eru til viðgerðar, spyr løgtingsformaðurin, áðrenn orðaskiftið byrjar, hvørjir framsøgumenn biðja um orðið. Teir fáa orðið eftir floksstødd. Tingformaðurin kann geva einum løgtingsmanni úr hvørjum flokki orðið til í 1 minutt at seta fram viðmerkingar, eftir at hvør framsøgumaður hevur havt orðið. Uppskotssetarin kann fáa orðið eftir framsøgumenninar. Aðrir tingmenn, løgmaður og landsstýrismenn fáa orðið í teirri raðfylgju, teir biðja um tað.
*Stk. 2.* Tá ið framløga og umrøða eru, eru tær talutíðir galdandi, sum standa í skjalinum til hesa tingskipan.
*Stk. 3.* Løgtingsformaðurin kann loyva frávik frá talutíðunum í stk. 2, tá ið vavið í einum máli ger tað neyðugt.
*Stk. 4.* Hóast tær ásettu talutíðirnar kann formaðurin í føri, hann heldur tað vera hóskiligt, geva løgtingsmonnum orðið at seta fram stuttar viðmerkingar, sum kunnu vera í longsta lagi í 1 minutt. Tá ið serligar umstøður eru fyri tí, kann formaðurin geva løgtingsmanni orðið til viðmerking at svara aftur; men má tað ikki verða longur enn 5 minuttir.
*Stk. 5.* Løgmaður, landsstýrismenn og ríkisumboðsmaðurin hava eftir stýrisskipanarlógini § 14 rætt til at krevja at koma til orðanna á fundum.

**§ 70.** Talar røðari longur, enn loyvt er, kann formaðurin taka orðið frá honum, tá ið hann einaferð hevur mint hann á, at talutíðin er úti. Tá kann hann ikki fáa orðið aftur, meðan sama málið er til ta viðgerðina.
*Stk. 2.* Heldur formaðurin, at løgtingsmaður málber seg óhøviliga, kann hann átala hetta. Um løgtingsmaðurin ikki lýður formansins átalu, kann formaðurin taka orðið frá honum. Formaðurin kann hereftir sýta honum orðið av nýggjum á sama fundi.
*Stk. 3.* Reglurnar í stk. 2 verða eisini nýttar, um so er, at løgtingsmaður á annan hátt grovliga brýtur skilhaldsreglurnar.
*Stk. 4.* Um so er, at løgtingsmaður ger ikki eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, hevur formaðurin skyldu at leggja niður fundin, ella um neyðugt, slíta fundin.

**§ 71.** Á løgtingi er viðmælis ella mótmælisrómur ósiður.

**§ 72.** Heldur formaðurin ella 4 løgtingsmenn, at umrøðan gerst ov drúgv, kunnu teir skjóta upp, at umrøðan endar. Løgtingið tekur tá avgerð um hetta uttan umrøðu.

**§ 73.** Almenningurin skal, uttan at møta á tingfundi, kunna fylgja við øllum umrøðum á almennum løgtingsfundum.

**§ 74.** Gerðabók frá tingfundi skal vera almenn innan næsta tingfund. Eru innan 3 yrkadagar eingi skrivlig mótmæli ímóti orðingini handað løgtingsformanninum, verður hildið, at Løgtingið hevur samtykt gerðabókina, og Løgtingsformaðurin og tann, sum skrivað hevur gerðabókina, skriva undir hana
*Stk .2.* Verða skrivlig mótmæli sett fram, setir formaðurin á dagsskrá at samtykkja gerðabókina fyri fundin, træta er um, og á tí fundinum verður málið umrøtt, og á sama fundi verður sett til endaliga atkvøðugreiðslu at góðkenna gerðabókina fyri fundin.

## KAP. V ATKVØÐUGREIÐSLUR

**§ 75.** Formaðurin setir fyrst undir atkvøðugreiðslu broytingaruppskotini til upprunauppskotið og ger av, hvussu verður atkvøtt um tey, hvørt eftir annað.
*Stk. 2.* At enda verður atkvøtt um upprunauppskotið við teim samtyktu broytingaruppskotunum, og fellur tað, eru eisini broytingaruppskotini fallin burtur.

*Stk. 3.* Formaðurin ræður annars fyri, hvussu atkvøtt verður.

**§ 76.** Atkvøðugreiðsla á Løgtingi er á telduskipan. Løgtingsmenn atkvøða antin fyri, atkvøða ímóti, ella atkvøða ikki. Telduskipanin skrásetir, hvussu hvør einstakur hevur atkvøtt í einstøku málunum.
*Stk. 2.* Í teimum førum, hendan skipan ikki er tøk, verður atkvøtt við navnakalli. Tveir løgtingsmenn, sum løgtingsformaðurin heitir á, veita løgtingsformanninum hjálp, tá ið atkvøðugreiðslan verður tald.
*Stk 3.* Um tingmenn nokta at taka lut í atkvøðugreiðslu, verða teir skrásettir sum ikki at hava atkvøtt

**§ 77.** Løgtingsmál er sbrt. stýrisskipanarlógini § 18 samtykt, eru fleir enn helmingur av øllum tingmonnum á fundi, og fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Eru líka nógvar atkvøður fyri og ímóti, er málið fallið.

**§ 78.** Sbrt. § 20 í stýrisskipanarlógini velur løgtingið limir í nevndir og størv við lutfalsvali. Lutfalsvalið verður eftir reglunum í løgtingsvallógini.
*Stk. 2.* Tá ið eitt ella fleiri fólk verða vald, kann bara verða atkvøtt fyri, ella atkvøður ikki. Tó kann í teim førum, tá ið ikki øllum tingmonnum er loyvt at seta fram valevni, verða atkvøtt ímóti, t.d. í løgmanstilnevning sbrt. stýrisskipanarlógini § 28.
*Stk. 3.* Skal bara eitt fólk verða valt, krevst, tá ið einki annað er lógásett, fleiri enn helmingurin av tingmanningini fyri. Fær eingin tað, verður síðani valt enn einaferð. Fær heldur eingin tá helmingin av tingmanningini, verður 3. atkvøðugreiðsla. Tá verður valt í millum teir báðar, ið fingu flestu atkvøðurnar við 2. atkvøðugreiðslu, stendur á jøvnum, ræður lutakast. Við hesi 3. atkvøðugreiðslu vinnur hann, ið fær flestu atkvøðurnar, stendur á jøvnum, ræður lutakast.

**§ 79.** Heldur løgtingsformaðurin, at allir tingmenn eru samdir, kann hann gera tinginum kunnugt, at mál er samtykt, og atkvøðugreiðsla er ikki. Mælir tingmaður tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
*Stk. 2.* Vanlig atkvøðugreiðsla skal altíð vera, tá ið samtykt skal verða endaligt løgtingslógaruppskot, ríkislógartilmælisuppskot, uppskot til samtyktar, val av løgtingsformanni, løgmanstilnevning ella misálitisuppskot á løgmann ella landsstýrismann. Harumframt skal vera vanlig atkvøðugreiðsla, tá ið løgtingið samtykkir at víkja frá tingskipanini sbrt. § 85.

## KAP. VI YMSAR ÁSETANIR

**§ 80.** Sbrt. stýrisskipanarlógini § 22 kann eingin umsókn verða løgd fyri løgtingið, uttan at tingmaður ella landsstýrið flytur hana fram.
*Stk. 2.* Skriv til løgtingið verða ikki skrivað í gerðabók ella upplisin á tingfundi uttan í teimum førum, løgtingsformaðurin heldur, at talan er um serligt undantak. Eitt eintak verður latið formanninum í hvørjum flokki á tingi. Yvirlit yvir skrivini verða kunngjørd, so tingmenn hava høvi at biðja um avrit av hesum skrivum.

**§ 81.** Á løgtingi kann eingin fáa orðið uttan løgtingsmaður, løgmaður, landsstýrismaður ella ríkisumboðsmaðurin.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin kann loyva ríkisovastum og fremmandum tingformonnum at halda røðu fyri løgtingsmonnum á løgtingsfundi.

**§ 82.** Allar munnligu umrøðurnar á løgtingi verða goymdar sbrt. løgtingslóg um upptøku av munnligu umrøðunum á løgtingi.

**§ 83.** Orðaskifti og Løgtingstíðindi verða goymd á teldumiðli.
*Stk. 2.* Stjórin hevur ábyrgdina av, at øll uppskot, nevndarálit og onnur mál verða førd í Løgtingstíðindi, so hvørt tey verða løgd fram.
*Stk. 3.* Í Løgtingstíðindi verður upptikið:
**I.** Løgtingsmál
1) Hesi uppskot:
   a) uppskot til løgtingslógir,
   b) uppskot til ríkislógartilmæli,
   c) uppskot til løgmanstilnevning,

d) misálitisuppskot á løgmann ella landsstýrismann,
e) uppskot til løgtingssamtyktir,
f) velja fólk,

2) nevndarálit og broytingaruppskot í málinum,
3) umrøður í málinum, sum avskrivaðar eru,
4) endaliga úrslitið av málsviðgerðini.

**II.** Løgmansrøðan og serligar frágreiðingar frá løgmanni ella landsstýrismonnum og avskriftir av orðaskiftum, sum til eru.
**III.** Skrivliga settir og svaraðir spurningar og fyrispurningar og munnligar umrøður av skrivligum og munnligum fyrispurningum, sum avskrivaðir eru.
**IV.** Skrivliga settir og svaraðir spurningar eftir § 52 a.
**V.** Gerðabók løgtingsins.
**VI.** Gerðabøkur løgtingsnevndarinnar.
**VII.** Atkvøðuskrásetingar sbrt. § 76, stk. 1.
**VIII.** Innkomin skriv til løgtingið.

*Stk. 4.* Skjøl, sum verða løgd fram á afturlatnum løgtingsfundi, umrøður ella atkvøðugreiðslur á slíkum fundum, verða ikki tiknar upp í Løgtingstíðindum, uttan so er, at løgtingsformaðurin heldur, at orsakirnar at halda skjølini loynilig eru ikki til longur.

**§ 84.** Á hvørjum ári í juni mánaði umrøða formansskapurin og stjórin fíggjarætlanina hjá løgtinginum og umsiting tingsins fyri næsta fíggjarár.
*Stk. 2.* Formansskapurin letur landsstýrinum tilmæli til játtan løgtingsins á komandi fíggjarløgtingslógaruppskoti landsstýrisins innan 1. juli.

**§ 85.** Í sera átrokandi førum kann, eftir uppskoti frá formanninum ella eftir skrivligum uppskoti frá 6 tingmonnum, verða vikið frá tingskipanini við teirri treyt, at tingskipanin er ikki grundað á lógarreglur, og við teirri treyt, at í minsta lagi tríggir fimtingar av tingmonnum á fundi greiða atkvøðu fyri.

## KAP. VII
## GILDISFYRISKIPANIR OG SKIFTISREGLUR

**§ 86.** Uppskot til broyting í hesi tingskipan fær á løgtingi viðgerð eftir hesi tingskipan § 36 - § 43 og kann ikki fáa gildi fyrr enn ólavsøkudag eftir samtyktina.

**§ 87.** Tann broytta tingskipanin fær gildi frá ólavsøkudegi 1996.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi Tingskipan Føroya Løgtings frá 1. juni 1995.

**SAMTYKT Á LØGTINGI 1. juni 1995 og broytt 15. mai 1996, 23. apríl 1999, 2. mai og 14. desember 2007, 31. mai 2008, 10. mai 2010 og 14. mai 2011.**

**Hergeir Nielsen**
**løgtingsformaður**

**/ Súsanna Danielsen**
**stjóri tingsins**

### Talutíðir

**Framløgutíðirnar eru til løgmansrøðuna 1 tími og til aðrar frágreiðingar frá løgmanni og landsstýrismonnum 30 minuttir**

**I. Uppskot til løgtingslóg og ríkislógartilmæli**

| 1. viðgerð | 1. ferð | 2. ferð | 3. ferð |
|---|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Uppskotssetari, framsøgumenn, løgmaður og landsstýrismenn | 10 | 5 | 2 |
| Løgtingsmenn | 5 | 5 | 2 |
| **2. viðgerð** | **1. ferð** | **2. ferð** | **3. ferð** |
| Nevndarlimir, uppskotssetari og framsøgumenn fyri flokkar uttan fyri nevnd | 10 | 7 | 5 |
| Onnur | 5 | 3 | 2 |
| **3. viðgerð** | **1. ferð** | **2. ferð** | **3. ferð** |
| Uppskotssetari og framsøgumenn | 5 | 3 | 0 |
| Onnur | 3 | 0 | 0 |

**II. Uppskot til samtyktar**
Somu talutíðir, sum tá uppskot til løgtingslóg eru til 1. og 2. viðgerð.

**III. 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarløgtingslóg, løgmansrøðan, frágreiðingar frá løgmanni ella landsstýrismanni og uppskot til misálitisváttan á løgmann ella landsstýrismann**

| | 1. ferð | 2. ferð | 3. ferð |
|---|---|---|---|
| Uppskotssetari, framsøgumenn, løgmaður og landsstýrismenn | 15 | 10 | 5 |
| Løgtingsmenn | 10 | 5 | 3 |

Talutíðirnar til 2. og 3. viðgerð av uppskoti til fíggjarløgtingslóg eru tær somu, sum tá uppskot til aðrar løgtingslógir eru til 2. og 3. viðgerð.

**IV. Skrivligir fyrispurningar**

| | 1. ferð | 2. ferð | 3. ferð |
|---|---|---|---|
| Spyrjari | 10 | 5 | |
| Svarari | 10 | 5 | |
| Onnur | 5 | 5 | |
| Spyrjari | | | 5 |
| Svarari | | | 5 |

**V. Munnligir fyrispurningar**

| | 1. ferð | 2. ferð | 3. ferð |
|---|---|---|---|
| Spyrjari | 2 | | |
| Svarari | 2 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Aðrir tingmenn | 1 | | |
| Spyrjari | | 2 | 2 |
| Svarari | | 2 | 2 |

**VI. Ófráboðaðir  fyrispurningar**

| | |
|---|---|
| Spyrjari | 1 |
| Svarari | 2 |
| Aðrir tingmenn | 1 |
| Spyrjari | 1 |
| Svarari | 1 |

Stuttar viðmerkingar 1 minutt